umhvørvisstovan

## FRÁBOÐAN UM UMHVØRVISGÓÐKENNING

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 14. juli 2008, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mai 2008, og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Smoltstøðina hjá P/F Fútaklettur á Fútakletti (S-07)**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

# Lærari til Hovs skúla

Søkt verður eftir lærara til uml. 5-8 avlopstímar um vikuna fyri skúlaárið 08/09.

Í Hovs skúla eru 3 næmingar, harav 2 í 5. fl. og 1 í 7. flokki.

Umsóknir skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 1. august, og skulu sendast til Óla Johannesen, Sjógøta 118, 800 Tvøroyri.

Meira fæst at vita frá skúlaleiðaranum Óla Johannesen, tlf. 272647.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**HOVS SKÚLI**

LÍTLIFLØTTUR

## Pedagogar til dagstovnin Lítlafløtt á Strondum

Søkt verður eftir tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna, ella eftir nærri avtalu, at byrja 18. aug. 2008.

**Vit ynskja**

- At tú hevur hug og árræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing fyri tí einstaka barninum
- At tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- At tær dámar væl at vera úti og sært møguleikar og avbjóðingar, sum eru í nærumhvørvinum
- At tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv, har tú saman við góðum starvsfelagum fært møguleika at byggja upp eitt spennandi pedagogiskt umhvørvi á einum nýggjum stovni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommuna Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at tosa við Sonlis H. Joensen, leiðara á tlf. 23 27 47, ella Bjørg Olsen, varaleiðara á tlf. 74 79 29.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. aug. 2008, kl.12.00.

**Dagstovnurin Lítlifløttur**
**Fløtuvegur 82**
**490 Strendur**



## Til Sølu fyri 148.000,-

Opel Corsa árg. 07 sum nýggjur
4 Vetrar dekk á felgun v/ skálum fylgja við
***Ný prísur 170.000***

**Tel. 222224**

Sankta Frans skúli
Varðagøta 10
FO 100 Tórshavn
Tlf. 302530 ella 302532

# Lærarastørv í Sankta Frans skúla

Søkt verður eftir tveimum lærarum fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi at byrja ávikavist 1. aug. og 29. sept. 2008.

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga virksemi skúlans
- Duga at samstarva og eru fyrikomandi
- Eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- Virknir luttaka í arbeiðinum áhaldandi at menna skúlan

Starv I er 23 tímar í tíðarskeiðnum 1. aug. 2008 til 31. juli 2009 og eru lærugreinirnar: støddfrøði, danskt, enskt og heimstaðarlæra.

Starv II er 20 tímar í tíðarskeiðnum 29. sept. 2008 til u. 16. mars 2009 og eru lærugreinirnar: støddfrøði, handarbeiði og serundirvísing.

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving, men um lærarar ikki søkja størvini, verða fólk, ið ikki hava fólkaskúlalærarútbúgving, sett í størvini.

Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvi, cv. og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 28. juli kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra á tlf. 302532 ella 220716

**Sankta Frans skúla**
Varðagøta 10
100 Tórshavn

Heygum & Petersen
advokatskrivstova

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí.

Opið verður aftur mánadagin 4. august.

Advokatskrivstovan hjá
Björn á Heygum & Alfred Petersen

Bøgøta 16 | postboks 164 | FO-110 tórshavn
Tlf. 351710 | fax 351711 | hp@adv.fo | www.h-p.fo

PE

**Sóknast eftir starvsfólki til handil okkara í miðbýnum at arbeiða um kvøldið.**

**Send eina umsókn til PE, Heykavegur 2, 110 Tórshavn**

***PE tí tað lønar seg***



## Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá 21. juli til 25. august.

Víst verður til fartelefonir á heimasíðuni.

**Götu Kommuna**

við Gjónna 2 · Postrúm 40 · FO- 510 Gøta
Tel 471000 · Faks 471001 · gota@gota.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo